# Tíð at halda føstulávint

**Um fáar dagar er føstulávint á skránni. Um alt landið lata vit okkum í skemtiklæði, ganga grýlu, sláa tunnu, eta føstulávintsbollar og hugna okkum saman.**

FØSTULÁVINT
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Fastalávint er fyri øll – børn sum vaksin. Nærum hvørt barn letur seg í grýluklæði, slær tunnu og fer út at ganga grýlu í stórum flokki millum húsanna um kvøldarnar. Øll royna tey at fáa so nógv góðgæti í posan sum gjørligt. Seinni fara tey, ið eru eitt sindur eldri og vorðin ov gomul til at ganga grýla, vanliga í grýludans, sum næstan er í hvørjari bygd og hvørjum býi.

### Hví hátíðarhalda vit fastalávint?

Orðið fastalávint er nýggjari í føroyskum og er komið úr plattýskum 'Vastelavent', ið merkir kvøldið fyri føstu. Í katólskari tíð var fastalávint føstuinngangur, áðrenn farið varð undir ta álvarsomu og strongu 40 daga longu føstuna. Fastalávinstmánadagur var seinasti dansidagur áðrenn sjálva føstuna, so umframt at geva øllum loyvi at eta tað, tey vildu, áðrenn tað var forboðið, var fastalávint eisini eitt tíðarskeið, har allar vanligu siðvenjurnar í dagligdegnum vórðu settar til viks. Í Suðurevropa nevna tey eina slíka veitslu 'karneval'. Orðini 'Carne vale' merkja 'Farvæl kjøt!'. Áðrenn trúbótina í 1536 var maturin í føstuni grovt breyð, fiskur o.t., so áðrenn føstuna ótu flest øll so nógv, tey megnaðu av ljósum breyði, kjøti og feitum mati. Aftaná trúbótina varð føstan eftir katólskari merking sett úr gildi, men fastalávint er tó ein varðveittur siður.



### Fastalávintsbollar (um 32 bollar)

**Deiggj:**
500 g mjøl
200 g smør
75 g ger
50 g sukur
1 tsk salt
2 egg
3 dl mjólk
**Smørkrem:**
100 g smør
100 g sukur
1 ssk mjøl
25 g marsipan
(alt tilfarið verður elt saman til bleytt deiggj)
**Fylla:**
køkukrem ella súltutoy
**Glasurur:**
100 g flormelis
2 tsk kakao
2 ssk kókað vatn

**Leiðbeining**:
Hita mjólkina flógva og loys gerina.
Koyr restina av tilfarinum í og elt deiggið væl.
Lat deiggið ganga í 15 min.
Být deiggið í tvey eins stór stykki og rulla tey út í tveir fýrkantar á 30x30 cm.
Být báðar fýrkantarnar í 16 javnstór stykki.
Legg eina tsk av smørkremi á hvørt stykki, og lat bollan væl aftur.
Legg bollarnar á smurda plátu við afturlatingini niðureftir.
Trýst eitt hol við tummlinum í hvønn bolla og koyr køkukrem ella súltutoy í holið.
Lat deiggið aftur ganga í 15 min.
Pensla við eggi og baka bollarnar mitt í ovninum í 10-20 min. á 220°.
Prýð bollarnar við glasuri.

# Serligur grýluhandil

**Heima við hús, í Jónas Broncksgøtu 33 í Havn, hevur Birita Krossteig sín egna sermerkta handil. Hann eitur »Skortur«, og selur hon her at kalla alla grýlu- og sjónleikaraútgerð. – Skortar, klædnabúnar, andlitsmáling, parúkkar, hattar og aðra útgerð í sambandi við sjónleik**



FØSTULÁVINT
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Birita hevur rikið handilin í 5 ár. Hon byrjaði í smáum við einans at selja andlitsmáling, men virksemið vant sera skjótt upp á seg:

– Av fyrstan tíð valdi eg at fara undir haldilin hjá mær, tí tá eg sjálv spældi sjónleik, vóru vit ofta í teirri støðu, at vit ikki høvdu møguleika at keypa slíka útgerð í samband við sjónleik. Vit kundu sjálvandi bíleggja smyrsl úr Danmark, men tað tók ofta so langa tíð, at tað rætt og slætt ikki loysti seg.

Sjálv heldur Birita, at tað er sera stuttligt at arbeiða í tílíkum handli:

– Eg elski at ganga í handlinum og fjasa, royna ymiskar skortar o.t. Men tað stuttligasta av øllum er, tá fólk koma inn í handilin og royna ymiskt. Flest øll eru í góðum hýri og flenna, og um tey ikki eru glað, tá tey koma inn, eru tey tað í øllum førum, tá tey fara út aftur.

Besta ráðið Birita hevur at geva teimum, ið ikki ætla at nýta so nógvar pengar til grýluklæði, er at keypa ein parúkk:

– Ein parúkkur broytir okkara útsjónd alt fyri eitt, og so noyðast vit ikki at keypa stórvegis annað. Annars plagi eg altíð at biðja fólk fara niðan í Blákrossbúðina at keypa sær klæðir, og so kunnu tey koma aftur her at keypa tilhoyrið – tenn, oyru, nøs, smyrsl o.s.fr.

Birita Krossteig heldur, at fólk nú á døgum eru meira tilvitað um, at tað skjótt er fastalávint, og at føroyingar flestir hugsa nógv um grýluklæðini:

– Fyrr fóru øll mestsum bara í skundi upp á ovastaloftið og funnu okkurt fram, ið hóskaði. Men nú koma nógv longu í januar mánaði í handilin og leita eftir ymiskum til fastalávint.

Higartil arbeiðir Birita bara hálva tíð í handli sínum, men vónar, at um 1-2 ár fer at bera til eittans at liva av at selja sjónleikaraútgerð í Føroyum.

## Hvar er tunnusláttur og grýludansur?

**Á fastalávint fara mangir føroyingar í grýludans og sláa tunnu um alt landið í vón um at gerast kattarkongur. Men hvar er tunnusláttur og grýludansur á skránni?**

### Føstulávintsdansur í Vági

Væl umtókta suðuroyarorkestri Deiggj fara leygarkvøldið at spæla til føstulávintsdans í Stóra Pakkhúsi í Vági.

### Føstulávintshald í Skopun

Eins og undanfarin ár verður føstulávintshald í 'Samljóð' í Skopun. Atgongumerki á 200 kr. til borðhaldið og dansin kunnu fáast við at ringja til Torgerð Joensen (361373/224453) ella Meiken Krabenhøft (361151/216151).
Skráin fyri dagin er henda:
Kl. 16 tunnusláttur fyri vaksin (aldursmark 14 ár)
Kl. 19.30 borðhald – Lávur & Klávur undirhalda
Frá kl. um 23.30 spæla Signar í Homrum Band til dans.
Mánadagin 27. februar kl. 14. verður tunnusláttur fyri børn.

### Grýludansur í Havn

Leygarkvøldið skipar hondbóltsfelagið Neistin fyri grýludansi í ítróttahøllini á Hálsi. DJ Pætur Magnussen leggur løg á, og tríggjar tær vakrastu grýlurnar verða heiðraðar. Atgongumerki verða seld við dyrnar.

*Meira á síðu 26*